Eysturkommuna

# NEVNDARFUNDUR

## Býráðið

| | |
|---|---|
| **Dagfesting:** | 27.02.2025 kl. 17:00 |
| **Málnr.:** | |
| Nevndarlimir: | Per Martin Gregersen<br>Magnus Skoralíð<br>Hanna Jensen<br>Ann Fuglø<br>Heri Mikálsson<br>Pól í Skorini<br>Rebekka Jensen<br>Unn Jarnskor Ellingsgaard<br>Uni Rasmussen |
| Varalimir: | |
| Ikki møtt: | |
| Nevndarskrivari: | |


| **Málsyvirlit** | | | **Síða** |
|---|---|---|---|
| **Til viðgerð:** | | | |
| 10/25 | 24/00567-3 | Umsókn um marknaumskipan / keyp av jørð - matr. nr. 68 í Norðragøtu | 3 |
| 11/25 | 24/00654-3 | Umsókn um keyp av lendi - matr. nr. 72f í Norðragøtu | 5 |
| 12/25 | 25/00042-3 | Umsókn um stuðul - Tindur. Frágreiðing og tilmæli | 7 |
| 13/25 | 25/00057-1 | Kommunustýrisskipan - broyting 2025 | 9 |
| 14/25 | 25/00062-3 | Umsókn um stuðul - Reysti. Frágreiðing og tilmæli | 10 |
| 15/25 | 24/00610-2 | Ummæli um marknaðarumskipan - at leggja part av matr. nr. 12a aftrat matr. nr. 5 við Gøtugjógv | 12 |
| **Viðgjørt fyri aftulatnum hurðum:** | | | |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 16/25 | 25/00072-2 | Umsókn um skuldarskipan | 14 |
| | | | |

**Til viðgerð:**

## 10/25 Umsókn um marknaumskipan / keyp av jørð - matr. nr. 68 í Norðragøtu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 19.02.2025 | 6/25 | 24/00567-3 |
| 2 Býráðið | 27.02.2025 | 10/25 | 24/00567-3 |
| 3 Fíggjarnevnd | 24.02.2025 | 3/25 | 24/00567-3 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Eysturkommuna hevur móttikið umsókn um at keypa part av matr. nr 72f, at leggja aftrat matr. nr. 68 í Norðragøtu.<br><br>Økið sum eigarnir ynskja at keypa liggur partvís sum A, Miðstaðarøki og B, Bústaðarøki í býarætlanini fyri Eysturkommunu.<br><br>Til ber ikki at marknaðarumskipa hetta økið, tí hetta liggur í tveimum ymiskum økjum í býarætlanini. Um hetta skal marknaðarumskipast er neyðugt, at broyta býarætlanina, so hetta liggur sum sama øki í býarætlanin, og Eysturkommuna hevur ikki ætlanir um at broyta hetta.<br><br>Harumframt hevur Eysturkommuna ætlanir um at gera eina sniðgøtu millum Tróndargøtu og við Korkusá fyri at binda vegirnar saman og fríðka øki, og møguliga gera eitt parkeringsøki fram við Tróndargøtu. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| |

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin mælir frá, at selja part av matr. nr. 72f. |

**Byggi - og býarskipanarnevnd 19. februar 2025**
Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Fíggjarnevnd 24. februar 2025**
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

**Býráðið 27. februar 2025**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini og fíggjarnevndini.

## 11/25 Umsókn um keyp av lendi - matr. nr. 72f í Norðragøtu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 19.02.2025 | 8/25 | 24/00654-3 |
| 2 Fíggjarnevnd | 24.02.2025 | 4/25 | 24/00654-3 |
| 3 Býráðið | 27.02.2025 | 11/25 | 24/00654-3 |

**Málslýsing:**

Eysturkommuna hevur móttikið umsókn um keypa av parti av matr. nr. 72f, at leggja aftrat matr. nr. 73 í Norðragøtu.

Tað liggur eitt líknandi mál ið varð samtykt í Gøtu kommunu 30.10.2007 og hetta er ongantíð framt, tí talan tá var um at sundurbýta matr. nr. 73, og Gøtu kommuna vildi hava eina ætlan fyri havt skuldi byggjast har. Hendan ætlanin er ongantíð komin, og tí má hetta takast upp til viðgerðar av nýggjum.

Eigarin ynskir ikki, at sundurbýta matr. nr. 73, men bert at keypa øki.

Til ber ikki at marknaðarumskipa hetta, tí hetta liggur í tveimum ymiskum økjum í býarætlanini, A-Miðstaðarøki og B, bústaðarøki . Um hetta skal marknaðarumskipast er neyðugt, at broyta býarætlanina, so hetta liggur sum sama øki í býarætlanin, og Eysturkommuna hevur ikki ætlanir um at broyta hetta.

Harumframt hevur Eysturkommuna ætlanir um, at gera eina sniðgøtu millum Tróndargøtu og við Korkusá fyri at binda vegirnar saman og fríðka øki, og møguliga gera eitt parkerings øki fram við Tróndargøtu.

Sí skjøl í málinum.

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmæli**

Umsitingin mælir frá, at selja part av matr. nr. 72f.

**Byggi - og býarskipanarnevnd 19. februar 2025**

Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Fíggjarnevnd 24. februar 2025**
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

**Býráðið 27. februar 2025**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini og fíggjarnevndini.

## 12/25 Umsókn um stuðul - Tindur. Frágreiðing og tilmæli

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 13.02.2025 | 3/25 | 25/00042-3 |
| 2 Fíggjarnevnd | 24.02.2025 | 5/25 | 25/00042-3 |
| 3 Býráðið | 27.02.2025 | 12/25 | 25/00042-3 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Kapplóðrarfelagið Tindur søkir um stuðul til kappingarárið 2025.<br>Tindur hevur nú 8 ár á baki og nógv orka er brúkt uppá felagið.<br>6 bátar eru hjá roðrarfelagnum, tó má eitt nýtt seksmannafar byggjast.<br>Felagið hevur yvir 150 limir og í 2024 vóru 9 manningar við í FM-róðrinum. Báði í FM-róðrinum í fjør og til DM nú í januar vóru fleiri góð úrslit hjá Tindi.<br>Felagið hevur somuleiðis fingið heimasíðu, Tindur.fo<br><br>Mál fyri 2025:<br>At byggja nýtt seksmannafar og viðlíkahalda verandi bátar.<br>At manna allar bátar og tryggja framhaldandi góð úrslit<br>At spika fyri sosialum tiltøkum og økja um trivnaðin hjá limunum<br>At keypa nýggjar rógvimaskinur, tær núverandi er slitnar. (ein rógvimaskina kostar 10.500 kr)<br>At keypa nýggj klæðir<br><br>Umbiðin upphædd: 200.000 ke.<br><br>Stuðul undanfarin ár:<br>2022: 100.000 kr.<br>2023: 100.000 kr.<br>2024: 100.000 kr. (umbiðið 150-200.000 kr.) |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Á fíggjarætlanini fyri 2025 eru 850.000 kr. settar av til rakstrarkonto 524, "Stuðul til ítrott". Herav eru per d.d. 850.000 kr. tøkar. |

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin mælir til at ganga umsóknini partvíst á møti |

**Mentanarnevndin 13. februar 2025**
Mentanarnevndin mælir til at lata umsøkjaranum 100.000 kr. í vanligum rakstrarstuðli. Spurningurin um keyp av nýggjum maskinum verður viðgjørdur seinni.

**Fíggjarnevnd 24. februar 2025**
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini

**Býráðið 27. februar 2025**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini og fíggjarnevndini

## 13/25 Kommunustýrisskipan - broyting 2025

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðið | 30.01.2025 | 9/25 | 25/00057-1 |
| 2 Býráðið | 27.02.2025 | 13/25 | 25/00057-1 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Víst verður til fyriliggjandi uppskot til kommunustýrisskipan fyri Eysturkommunu |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| |

| **Tilmæli** |
|---|
| |

**Býráðið 30. januar 2025**
Einmælt samtykt at arbeiða víðari við málinum til komandi býráðsfund tá 2. viðgerð verður.

**Býráðið 27. februar 2025**
Einmælt samtykt at góðkenna fyriliggjandi uppskot til kommunustýrisskipan

## 14/25 Umsókn um stuðul - Reysti. Frágreiðing og tilmæli

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 13.02.2025 | 6/25 | 25/00062-3 |
| 2 Fíggjarnevnd | 24.02.2025 | 7/25 | 25/00062-3 |
| 3 Býráðið | 27.02.2025 | 14/25 | 25/00062-3 |

| Málslýsing: |
|---|
| Svimjifelagið Reysti søkir um stuðul til kappingarárið 25/26<br>Svimjifelagið økir støðugt um limatalið og telur í dag 109 svimjarar. Somuleiðis eru venjingartímarnir hækkaðir frá 6 til 10 tímar um vikuna.<br>Reysti ger seg nú eisini galdandi í kappingum, har tey t.d. vunnu 6 gull-, 4 silvur- og 3 bronsumedaljur í seinastu kapping hjá SSF.<br><br>Mál fyri framtíðini eru m.a. at seta høvuðsvenjara, at hava fleiri kappingarlið (sum nú er, er eitt) og greiða venjingarætlan.<br>Rakstrarútreiðslur eru primert til venjarar og til kappingar, har ymiskur kostnaður er tengdur (matur, feriðing etc.)<br><br>Umbiðin upphædd: 95.000 kr.<br><br>Stuðul til felagið undanfarin ár:<br>2020: 100.000 kr.<br>2021: 100.000 kr.<br>2022: Eingin umsókn<br>2023: 95.000 kr.<br>2024: Eingin umsókn |

| Fíggjarligar avleiðingar: |
|---|
| Á fíggjarætlanini fyri 2025 eru 850.000 kr. settar av til rakstrarkonto 524, “Stuðul til ítrott”. Herav eru per d.d. 850.000 kr. tøkar. |

| Tilmæli |
|---|
| Mælt verður til, at umsóknin verður gingin á møti |

**Mentanarnevndin 13. februar 2025**
Mentanarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini

**Fíggjarnevnd 24. februar 2025**
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini

**<u>Býráðið 27. februar 2025</u>**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini og fíggjarnevndin.

## 15/25 Ummæli um marknaðarumskipan - at leggja part av matr. nr. 12a aftrat matr. nr. 5 við Gøtugjógv

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 24.10.2024 | 42/24 | 24/00610-2 |
| 2 Býráðið | 31.10.2024 | 58/24 | 24/00610-2 |
| 3 Byggi - og býarskipanarnevnd | 23.01.2025 | 2/25 | 24/00610-2 |
| 4 Býráðið | 30.01.2025 | 2/25 | 24/00610-2 |
| 5 Byggi - og býarskipanarnevnd | 19.02.2025 | 7/25 | 24/00610-2 |
| 6 Býráðið | 27.02.2025 | 15/25 | 24/00610-2 |

**Málslýsing:**

Eysturkommuna hevur móttikið teldupost dagfest 10. oktober 2024 frá Búnaðarstovuni, har heitt verður á kommununa, um at ummæla eitt keyp av uppískoytisstykki av festinum matr. nr. 12a at leggja aftrat matr. nr. 5 við Gøtugjógv.

Sí skjøl í málinum.

**Ískoyti 22.01.2025**
Umsitingin hevur havt ummæli frá Búnaðarstovuni til hoyringar hjá eigaranum av matr. nr. 9, 29 og 30a við Gøtugjógv. Freistin at svara hoyringini var 12. des. 2024. Eysturkommuna hevur ikki móttikið nakrar viðmerkingar ella klagur.

**Ískoyti 12.02.2025**
Viðv. ummælinum frá Búnaðarstovuni, hevur umsitingin gjørt eitt kort sum vísur hvussu umskipanin eigur at skipast. Vísandi til kortskjal 1 – 05.02.2025, skal reyða øki leggjast afturat matr. nr. 5, grøna og bláa øki verður lagt aftrat matr. nr. a.

**Fíggjarligar avleiðingar:**

Ongar.

**Tilmæli**

Umsitingin mælir til, at samtykkja ummæli til Búnaðarstovuna.

**Ískoyti 22.01.2025**
Umsitingin mælir til, at samtykkja ummæli til Búnaðarstovuna.

**Ískoyti 12.02.2025**
Umsitingin mælir til, at samtykkja ummæli til Búnaðarstovuna við tí treyt, at hetta verður gjørt sambært vísta kortskjal 1 – 05.02.2025.

**Byggi - og býarskipanarnevnd 24. oktober 2024**
Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum við tí viðmerking, at vegurin verður tikin úr og latin Eysturkommunu.

**Býráðið 31. oktober 2024**
Málið tikið av skrá.

**Byggi - og býarskipanarnevnd 23. januar 2025**
Byggi- og býarskipanarnevndini tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Býráðið 30. januar 2025**
Einmælt samtykt at beina málið aftur í byggi- og býarskipanarnevndini til viðgerðar

**Byggi - og býarskipanarnevnd 19. februar 2025**
Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Býráðið 27. februar 2025**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

**Viðgjørt fyri aftulatnum hurðum:**

**16/25 málslýsing og tilmæl i - 25/00072 Umsókn um skuldarskipan**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevnd | 24.02.2025 | 10/25 | 25/00072-2 |
| 2 Býráðið | 27.02.2025 | 16/25 | 25/00072-2 |

fundurin lokin kl 18.00

________________________

Per Martin Gregersen

________________________

Magnus Skoralíð

________________________

Hanna Jensen

________________________

Ann Fuglø

________________________

Heri Mikálsson

________________________

Pól í Skorini

________________________

Rebekka Jensen

________________________

Unn Jarnskor
Ellingsgaard

________________________

Uni Rasmussen